## Landsrætturin legði hálvt ár omaná

**Landsrætturin herdi dómin yvir ein 48 ára gamlan mann, sum bankaði makan við einum hamara um nýggjársleitið. Dómararnir góvu manninum 15 mánaðir fyri harðskapin**

HAMARAMÁLIÐ
*Ingi Rasmussen*

Ein 48 ára gamal maður fekk tann 28. januar í ár dóm í Føroya rætti fyri at hava bankað eina konu so illa við einum hamara, at tað stóð um lív.

Føroya rættur metti hendingina til níggju mánaðir, hóast hann við vilja hevði hamrað hamaran fleiri ferðir beint íhøvdið á kvinnuni, sum hann livdi saman við. Maðurin rakti millum annað kvinnuna í tinningina, og læknarnir søgdu hana vera stutt frá deyðanum.

Dómurin vakti ans, og nógv hildu hann vera alt ov linan. Eitt nú Kvinnuhúsið gjørdi vart við, at tað heldur var harðskapsmaðurin, sum varð vardur, enn offrið. Linda Hesselberg, ákæri, royndi eisini at fáa mannin dømdan fyri drápsroynd, men til fánýtis. Ákæruvaldið royndi kortini málið við Landsrættin, tí harðskapurin varð so grovur.

Og Landsrætturin gav ákæruvaldinum viðhald. Mikudagin herdu teir tríggir landsrættardómararnir dómin og løgdu eitt hálvt ár omaná. Sostatt skal maðurin sita í fongsli í eitt ár og tríggjar mánaðir. Tann 48 ára gamli maðurin hevur sitið í varðhaldi síðan 30. desember í fjør, tá hann varð tikin fyri at hava bankað kvinnuna. Sostatt skal hevur hann eitt ár eftir av dóminum at sita.

Linda Hesselberg er nøgd við dómin, tí soleiðis ger samfelagið greitt, at tað ikki góðtekur harðskap, hóast fólk liva saman.

# Markið varð nátt

**Fólk føldu seg pressað persónliga, og tí var markið varð nátt fyri, hvat pressan toldi. Tað sigur Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri, sum ikki vildi finna seg í hóttanunum frá Páll á Reynatúgvu landsstýrismanni ímóti tíðindafólkum á Degi og viku**

HÓTTAN
*Ingi Rasmussen*



*Her til og ikki longur. Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri, helt tað vera neyðugt at markera, hvar markið gongur fyri, hvat pressan í Føroyum tolir*

*Mynd: Jens K. Vang*

Tíðindafólk skulu sjálvandi tola bæði atfinningar og at vera alment viðgjørd. Men tá politikarar beinleiðis venda sær persónliga til tín og hótta við at heingja títt privatlív út í fjølmiðlunum, so er markið nátt.

Tað sigur Mikkjal Helmsdal, stjóri í Sjónvarpi Føroya, sum rættiliga er komið í fokus, nú opið stríð leikar á millum Tjóðveldisflokkin og almenna sjónvarpið.

Tað snýr seg um Páll á Reynatúgvu, landsstýrismann við almannamálum. Eitt er, at hann hevur blakað eina tíðindakvinnu á dyr, tí hon ikki hevði fingið loyvi at koma inn í Almannaráðið. Eitt annað er, at hann beinleiðis hevur hótt tíðingafólkini við at heingja tey út.

Sambært brævinum, sum Mikkjal Helmsdal hevur sent Høgna Hoydal, floksformanni, hevur landsstýrismaðurin sagt seg »kanna persónligar upplýsingar um journalistar í SvF«. Endamálið er, at »næstu ferð tey hættaðu sær at vera kritisk móti Tjóðveldisflokkinum, skuldi hann syrgja fyri at almannakunngera so nógvar persónligar og betentar upplýsingar um tíðindafólk, at tey blivu spilt út í fjølmiðlunum.«

Páll á Reynatúgvu sjálvur vil vera við, at tað var sagt í skemti.

– Soleiðis var tað í øllum førum ikki skilt av teimum fólkunum, sum tað er sagt við, er Mikkjal Helmsdal skjótur at svara.

### Ein avleggari

Talan er um eina álvarsliga ákæru, har roynt verður at forða sjónvarpinum at gera sítt arbeiði, og tí kann tað undra fólk, at tað ikki er til løgmann, sjónvarpið hevur vent sær, Hann er leiðari í teirri skipan, sum sjónvarpsfólk vera forðað at arbeiða í, men SvF vil ikki gera tað til eitt mál millum skipanina og fjølmiðlarnar.

– Orsøkin er, at vit hildu, at málið er ein avleggari av tí, sum sjónvarpið hevði ført fram um Tjóðveldisflokkin (leikritamálið, blðm.), og tí hildu vit, at rætta adressan var at venda sær til flokkin. Vit hildu heldur ikki, at tað var okkara uppgáva at skapa persónsmál innanhýsis í samgonguni, sigur Mikkjal Helmsdal.

Men tað er júst tað, málið er blivið. Av tí, at Dimmalætting hevur almannakunngjørt brævið, er málið vorðið eitt persónsmál, sum løgmaður illa fær latið eyguni aftur fyri. Og tað bøtir neyvan um viðurskiftini við Tjóðveldisflokkin.

– Dimmalætting hevur biðið um alment innlit, tí teir søktu um tað. Eg havi ikki likið brævið til Dimmalætting, og eg havi heldur ikki biðið nakran gjørt tað, sigur Mikkjal Helmsdal.

### Fyrstu ferð

Tað er ikki óvanligt, at hvøss álop eru á fjølmiðlafólk. Tey eiga at tola eitt sindur av hvørjum. Serliga tey, ið sjálv hava sum vørumerki at vera ágangandi, og kunnu ganga sínum »offrum« nær.

Mikkjal Helmsdal er samdur, men hetta er eisini fyrstu ferð, at hann beinleiðis hevur upplivað, at fólk kenna seg hótt persónliga, og tí noyddist SvF at taka stig til at fáa málið avklárað.

– Eg havi ikki verið úti fyri slíkum fyrr í mínari tíð. Nógvur kritikkur hevur heglað yvir stovnin og einstaklingar. Men vit hava ongantíð havt dømi um, at farið er um tað markið, har starvsfólk hava følt seg pressað upp á sín persón. Eg metti í øllum førum málið ógvuliga álvarsligt, og tí skrivaði eg brævið til Tjóðveldisflokkin. Vit vildu markera, at har gongur markið, sigur Mikkjal Helmsdal.

# Løgmaður fylgir við frá síðulinjuni

**Talan er ikki um eina kæru til løgmann, og tí er ikki vist, at løgmaður ger nakað við grovu skuldsetingarnar hjá SvF ímóti Páll á Reynatúgvu, landsstýrismanni. Men løgmaður hevur merkt sær ógvusligu skuldsetingarnar hjá sjónvarpsstjóranum**

HÓTTAN
*Ingi Rasmussen*

– Eg kenni onki annað til málið, enn tað, sum eg havi lisið á forsíðuni í Dimmmalætting. Eg havi sjálvandi lisið tað, sum sjónvarpsstjórin sigur, og sjálvandi tosi eg við landsstýrismannin, tá eg síggi sovorðið. Men hetta er ikki eitt mál, sum er reist hjá mær, og tí fái eg illa gjørt meira við tað.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, er fáorðaður um grovu ákærurnar, sum Sjónvarp Føroya hevur sett fram ímóti Páll á Reynatúgvu, landsstýrismanni.

Mikkjal Helmsdal sjónvarpsstjóri førir fram í brævinum til Høgna Hoydal, formann Tjóðveldisfloksins, at landsstýrismaðurin hevur hótt tíðindafólk í eini roynd at tøla tíðinaflutninginum.

Løgmaður er stjóri hjá Páll á Reynatúgvu og skal syrgja fyri, at hann uppførir seg eftir reglunum. Men løgmaður ivast í, um hetta er eitt mál fyri hann. Ikki enn í øllum førum.

– Brævið hevur greiða adressu til floksformannin, og tað verður undirstrikað, at hetta ikki er ein kæra. Tí er hetta ikki eitt mál, sum løgmaður hevur ábyrgdina av, sum nú er, sigur Anfinn Kallsberg løgmaður, ið kortini viðgongur, at hann hevur ávísa skyldu at halda eitt vakið eygað við, hvat gongur fyri seg.

Hetta er eitt mál millum fjølmiðilin og valdsharran, og spurningurin er tí, um viðurskiftini teirra millum eru skalað. Anfinn Kallsberg er varin við at fara út í tað kjakið.

– Pressan hevur átikið sær at vera fjórða statsvaldið, so eg skal ansa mær at vevja meg út í tann spurningin. Men tað er greitt, at tað ofta veldst um eygað, sum sær, og oyrini, sum hoyra. Eg skal viðganga, at eg ikki altíð eri samdur við tað, sum kemur fram í pressuni, sigur Anfinn Kallsberg uttan at tosa um ítøkiliga málið.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



### Prógv á Húsarhaldsskúla Føroya

Eftir at hava gingið sjey mánaðar á Húsarhaldsskúla Føroya í Klaksvík, fingu hesir næmingarnir prógv handaði 22. februar.

Fremst frá vinstru: Christina Isaksen Tórshavn, Durita Samuelsen Klaksvík, Kristina Laksafoss Klaksvík, Irdi Lenvig Hansen Tórshavn, Gudny Helgadóttir Tórshavn, Jóna Zachariassen Eiði.

Í miðjuni frá vinstru: Jutta Hansen lærari, Gunhild Arge lærari, Paulina Eliasen lærari. Renata Joensen, Tórshavn. Guðrun Clementsen, Tórshavn. Jastrid Asa Hammer, Eiði. Maria í Skorini Tórshavn, Maria Meinhardsdóttir Jacobsen Søldarfjørður, Heidi Isaksen Klaksvík, Jóhanna Andreasen Klaksvík, Elisabeth Akursmørk lærari, Jóhanna á Tjaldrafløtti leiðari.

Aftast frá vinstru: Henny Heinesen Klaksvík, Lusy Christiansen Klaksvík, Sólgerð á Kinn Strendur, Sunnvá Sørensen Porkeri, Dania Sørensen Porkeri, Bára Joensen Klaksvík, Jóna Jacobsen Klaksvík og Karin Laksafoss Klaksvík.

### Sanna R. Danielsen 90 ár



Leygardagin 5. apríl verður Sanna R. Danielsen, f. Andreasen, vanliga nevnd Sanna á Høvdanum á Strondum 90 ár. Sanna giftist í 1939 við Jóan Karl Danielsen, á Fløtunum, eisini av Strondum. Hjúnalagið vardi stutt, tí Jóan Karl andaðist á útróðri 21. november 1940, bert 28 ára gamal. Saman fingu tey dóttrina Jóhannu, ið nú starvast sum skrivari hjá Havnar Handverkarafelag. Sanna eigur 3 ommubørn, 7 langommubørn og eitt oldurommubarn. Sanna er best kend frá handlinum á Høvdanum á Strondum, har hon hevur arbeitt stóran part av lívi sínum saman við systrini, Bette. Seinastu tíðina hevur hon búð á Eysturoyar Røktar & Ellisheimi í Runavík, har føðingardagurin eisini verður hildin leygardagin 5. apríl frá kl. 15-18.

### Árni Frederiksen 55 ár



Hósdagin 3. apríl fylti Árni Frederiksen lærari í Miðvági 55 ár. Árni er sonur Edvard Fredriksen og Elsu Margrethu, f. Ellefsen, bæði úr Miðvági. Hann er giftur við Marnu Dam av Argjum. Árni tók læraraprógv á Haslev Seminarium í 1972 og var lærari á Ellemarkskolen í Køge frá 1973-75 og á Alkestrupskolen í Tureby frá 1975-78. Síðan 1978 hevur hann verið lærari við Miðvágs/Sandavágs skúla.

# Nýggj djóralæknaviðtala í Havn



*Lars Mohr Nielsen, djóralækni*

Lars Mohr Nielsen, djóralækni, hevur latið upp nýggja djóralæknastovu í Stoffalág 31 í Havn. Umframt at hava viðtalu fyri landbúnaðin, hevur hann eisini latið upp praksis við tí fyri eyga at viðgera onnur djór, ið gerst ein alsamt størri partur av arbeiðinum hjá djóralæknum. Eisini kemur hann at luttaka í vaktarskipanini eftir nýggju avtaluni millum Landsdjóralæknan og djóralæknar í privatari praksis. Lars er útbúgvin djóralækni frá Landbúnaðarháskúlanum í Keypmannahavn í 1990. Eftir lokið prógv arbeiddi hann eitt ár á fiskasjúkudeildini hjá Landsdjóralæknanum. Í tvey og eitt hálvt ár arbeiddi hann sum djóralækni í Jyllandi. Tá hann kom heim aftur til Føroya, arbeiddi hann í umleið trý ár hjá Djóralæknatænastuni í Havn. Eftir tað fór hann í undirvísingar og granskingarstarv á Klinisk Institut á Landbúnaðarháskúlanum í Keypmannahavn. Tey seinastu árini hevur hann starvast á Dansk Veterinærinstitut og m.a. luttikið í tí stóru kanningini av smittandi sjúkum, ið Landsdjóralæknin hevur sett í verk í Føroyum. Í hesum tíðarskeiði hevur hann verið avloysari á eini djóraklinikk uttan fyri Keypmannahavn og í Føroyum. Eisini hevur hann luttikið í arbeiðinum til varðveitan av tí serstaka føroyska rossinum. Telefontíð og avtalur um vitjan eru á telefon 311041 frá kl. 8.00 til 9.00.

### Dagurin

4. apríl. Ambrosius, deyður í 397. Biskupur í Milano, verður nevndur sum ein av kirkjufedrunum.

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2